**Tíðindaskriv 27. mars 2014**

**Stjórnin**

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel.: 348000
Fax.: 348800

office@eik.fo
www.eik.fo

Swift: EIKB FO TF
Pf. skr. nr.: 5534

# Eik Banki 110 mió. kr. í avlopi eftir skatt

*Úrslitið fyri árið 2013 er betri enn væntað, og betri enn úrslitið fyri 2012. Úrslitið áðrenn skatt, virðisjavningar og niðurskrivingar er góðar 132 mió. kr. Við ársenda 2013 javnvigaði fíggjarstøðan við 7,3 mia. kr., og eginpeningur bankans var 1,3 mia. kr.*

“Miðvísa arbeiðið við at minka um útreiðslustøðið, og lægri niðurskrivingar eru saman við positivari gongd í íløguaktiviteti høvuðsorsøkirnar til, at úrslitið er betri enn væntað, hóast vit hava lækkað bústaðarrentuna og bidragið á realkredittlánum, og framvegis veita kundum fleiri ókeypis tænastur”, sigur Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

Í stuttum kann nevnast, at:

- Úrslitið fyri árið 2013 vísir eitt avlop á 110 mió. kr. eftir skatt.
- Úrslitið áðrenn skatt, virðisjavningar og niðurskrivingar er 132 mió. kr.
- Útlán bankans vóru 4,8 mia. kr.
- Innlán bankans vóru 5,8 mia. kr.
- Niðurskrivingar av útlánum og yvirtiknum ognum vóru 23 mió. kr.
- Gjaldførið er gott. Yvirdekningur í mun til lógarkravda gjaldførið var 220,6%
- Solvensurin við ársenda 2013 var 25,0%, meðan individuelli solvenstørvurin var 12,0%.

**Skilagott býti millum út- og innlán**
Bankin verður rikin á einum ráðiligum grundarlagi, og hetta sæst eitt nú aftur í býtinum millum innlán og útlán. Yvirskipaði málsetningurin hjá Eik er at fíggja útlán við eginpeningi og innlánum.

Av javnanum upp á 7,3 mia. kr. var eginognin 1,3 mia. kr., og innlán 5,8 mia. kr. Fyrra hálvár 2013 lækkaðu útlánini nakað. Henda gongd er vend, og seinna hálvár hækkaðu útlánini aftur, og vóru 4,8 mia. kr. við ársenda. Innlánini eru eisini í støðugum vøkstri og vóru 5,8 mia. kr. Sostatt vóru innlánini 948 mió. kr. hægri enn útlánini við ársenda 2013.

Um hædd verður tikin fyri uml. 1,1 mia. kr. í láni við statsveðhaldi, sum bankin rindaði aftur í februar 2013, eru innlánini vaksin við 320 mió. kr. síðan árslok 2012

**Rentulækkingar síggjast aftur**
Nettoinntøkurnar fyri rentur og ómaksgjøld lækkaðu í mun til 2012; úr 335 mió. kr. í 301 mió. kr. Hetta orsakað av, at Eik gekk undan og lækkaði lægstu bústaðarrentuna tvær ferðir í 2013, úr 5,25% niður í 3,75%. Harumframt lækkaði bidragið á realkredittlánum niður í 1,7%.

**Lægri niðurskrivingar**
Føroyski búskapurin tykist vera komin í eina tryggari legu. Hetta merkir, at niðurskrivingarnar vóru væl lægri í 2013 enn í 2012. Samlaðu niðurskrivingarnar upp á lán og ognir annars vóru 23,4 mió. kr., sammett við 2012, tá niðurskrivingar vóru framdar fyri uml. 61 mió. kr.

**Fokus á Føroyar og færri útreiðslur**
Eik Banki er bert virkin á føroyska marknaðinum, og okkara fremsta uppgáva er tí at tæna kundum okkara her. Seinastu trý árini hevur bankin lagt seg eftir at fremja effektiviseringar á øllum økjum, og harvið at lækka kostnaðarstøðið. Hetta sjálvsagt fyri at kunna reka bankan so skynsamt sum gjørligt, men eisini fyri framhaldandi at kunna veita kundunum góðar og í mongum førum ókeypis tænastur.

Útreiðslurnar til umsiting eru lækkaðar. Umsitingarútreiðslur vóru í 2013 kr. 63,6 mió. kr., og er hetta góðar 10 mió. kr. lægri enn í 2012, tá útreiðslurnar vóru 74,2 mió. kr.

Vit eru av tí fatan, at deildarnetið nú hevur eina hóskandi støðd. Eik Banki er umboðaður í øllum økjum í landinum, og har vit hava deildir, hava vit eisini kassaavgreiðslur. Ongar ætlanir eru, ella hava verið, um at áleggja kundunum eyka kostnað fyri at hava lønarkontu og eitt nú eftirlønaruppsparing í Eik.

Avgerðin um at seta føroyska kundan í miðdeplinum, sæst aftur í øktum virksemi við øktum innlánum og útlánum.

Aðrar rakstrarútreiðslur vóru tó enn høgar í 2013. Orsøkin til hetta var parturin hjá Eik av uppkravinum frá Garantifonden til allar peningastovnar í sambandi við, at Fjordbank Mors og Sparekassen Lolland fóru av knóranum.

**Nøktandi útlit hóast harðnaða kapping**
Kappingin á føroyska lánimarknaðinum er munandi harðnað, og væntandi fara rentulækkingarnar, sum framdar vóru í 2013, at síggjast aftur í roknskapinum fyri 2014. Ársúrslitið komandi ár verður væntandi millum 60 – 90 mió. kr. áðrenn skatt.

**Nærri upplýsingar:**
Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri. Tlf. 34 85 80, teldupostur ssj@eik.fo